# Fíggjarnevndin ongan veg komin við fíggjarlógini

**Sambært gerðabókini hevur fíggjarnevndin als ikki viðgjørt uppskotið til fíggjarlóg fyri 2008 enn**

POLITIKKUR
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Tað er ógvuliga sjáldsamt, at ein nevndarformaður fær ein fyrispurning í Løgtinginum, men tað hendi í gjár, tá Bill Justinussen úr Miðflokkinum spurdi Annfinn Kallsberg, formann í fíggjarnevndini, hvussu langt nevndin er komin við at viðgera uppskotið til fíggjarløgtingslóg fyri 2008.

Svarið frá formanninum gav eina týðiliga ábending um, at spyrjarinum nýttist ikki at hava samvitskubit av, at hann hevði nýtt hesa heimildina í tingskipanini at seta formanninum spurningin.

Annfinn Kallsberg svaraði, at tá hugsað verður um, hvussu langt er liðið út á árið, so mátti hann ásanna, at nevndin er komin væl styttri við viðgerðini enn onnur ár. Men tað hevði sína frágreiðing.

-Veruleikin er, at nevndin fær ikki arbeitt fyri Løgtinginum, tí tingfundirnir eru so drúgvir, at teir fara við allari tíðini, segði fíggjarnevndarformaðurin, sum hevði hug at harta tingmenn fyri at tosa meiri, nú tingfundirnir verða vístir í sjónvarpi.

### Ruðuleiki

Fleiri tingmenn úr andstøðuni fýltust á, at fíggjarlógarviðgerðin at kalla ongan veg er komin, og at tað rætta hevði verið at havt eina fyribilsfíggjarlóg frá ársskiftinum til aftan á løgtingsvalið. Onkur helt, at alt arbeiðið hjá samgonguni er ein ruðuleiki í løtuni, og at stundin er komin til at gera upp og skifta fólk beinanvegin.

Tingmenn vildu eisini hava at vita, um tær útreiðslur, sum standast av uppskotum, sum nú koma fyri Løgtingið, eru við í fíggjarlógaruppskotinum. Annfinn Kallsberg svaraði, at ein partur av hesum útreiðslunum eru við, men at summar útreiðslur eru ikki við í uppskotinum.

### FAKTA

Uppskotið til løgtingsfíggjarlóg varð lagt fyri Løgtingið tann 28. september. Frá 3. til 5. oktober fekk uppskotið 1. viðgerð í Tinginum og varð so beint í fíggjarnevndina. Sambært gerðabókini hevur nevndin havt sjey fundir síðani, men fíggjarlógaruppskotið hevur bert verið á borðinum tríggjar ferðir. Ta einu ferðina býttu nevndarlimirnir málsøkini sínamillum, sum siður er, ein viðgerð tók ein hálvan tíma, og triðju ferð varð málið útsett.



*Annfinn Kallsberg: -Fíggjarnevndin fær ikki arbeitt fyri Løgtinginum, tí tingfundirnir fara við allari tíðini*


# Íløgukvøld

Suðuroyar Sparikassi bjóðar øllum áhugaðum til kunnandi tiltak um íløgur. Tú kemur at frætta um gongdina á parta- og lánsbræva marknaðinum og hvussu tú kanst samanseta tínar íløgur. Tiltakið verður:

**27. november 2007, kl. 20 á Hotel Bakkanum, Vágur**

Íløgukvøldið er í samstarvi við Sparinvest, sum m.a. stendur aftanfyri Danmarks best umtóktu partabrævadeild – Value Aktier.

Tilmelda teg innan 23. november á telefon 359870, í eini av deildum okkara ella á t-post: marner@sparsu.fo

Eftir tiltakið verður lætt ábit.

Sparinvest
Investering med omtanke...

SUÐUROYAR SPARIKASSI